## Misnøgdar kommunur

Kommunurnar í Føroya Kommunufelag eru misnøgdar við ætlanina hjá landsstýrinum at skipa landið í fimm eldraøki við einari felags upptøkunevnd, har landið skal hava fýra limir og kommunurnar tríggjar limir. Føroya Kommunufelag heldur, at við hesum missa kommunurnar ræðisrættin á sambýlum og røktarheimum, og felagið heldur í, at tað rættasta hevði verið, at landið samstundis eisini átekur sær alla ta fíggjarligu ábyrgdina á økinum.

## Nýggir egningarskúrar

Útróðrarmenn, sum rógva út í Sørvági, hava sambært heimasíðuni hjá kommununi ongantíð havt so góðar umstøður sum nú, eftir at níggju nýggir egningarskúrar vórðu tiknir í nýtslu um vikuskiftið. Pláss er fyri tólv egnarum í hvørjum skúri, og hvør skúrur hevur frystarí, sum tekur 120 stanmpar. Harafturat eru kantina og 2 wc til skúrarnar. Nýggju skúrarnir eru bygdir sum smá neyst og fella væl inn í umhvørvið á havnarlagnum.

# Fiskurin er væl fyri, men stovn

**- Toskurin á landgrunninum er illa fyri, hýsa og upsi eru í minking. Toskur og hýsa eru hampiliga væl í holdum, men upsin er rakari. Hetta er í stuttum fyribilsboðskapurin hjá Fiskirannsóknarstovuni, nú Magnus Heinason hevur gjørt sínar vár yvirlitstrolingar í ár**

FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Magnus Heinason er nú liðugur við sínar vár yvirlitstrolingar, sum skulu geva eina ábending um, hvussu toskur, hýsa og upsi eru fyri. – Øll fiskasløgini eru í minking, men toskur og hýsa eru væl í holdum. Fiskurin er smáur, tí veiðitrýstið er ov stórt, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur*

*Mynd: Rógvi Mouritsen*

Í Sosialinum herfyri høvdu vit eina styttri grein um yvirlitstrolingarnar, sum skipið hjá Fiskirannsóknarstovuni, Magnus Heinason, nýliga hevur gjørt. Tá vit tosaðu við toktleiðaran, Jákup Reinert, vóru tey ikki liðug at skráseta og samanbera øll úrslitini við undanfarin ár, og tí kundi fiskifrøðingurin ikki siga heilt ítøkiliga, hvat yvirlitstrolingarnar í vár endaliga vístu.

Saman við sær á ferðini við Magnusi Heinasyni, hevði Jákup Reinert eisini Hall Joensen, Mourits M. Joensen og Rógva Mouritsen.

### Stovnsmetingar

Magnus Heinason hevur gjørt tveir túrar í vár við yvirlitstrolingum, sum hesar verða róptar. Høvuðsendamálið er í fyrsta lagi at fáa til vega tilfar, sum skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa.

- Veiða í vekt og tali verður skrásett, eins og longdarbýtið, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu fiskasløgum. Aftrat hesum skulu magar takast regluliga av toski, hýsu og upsa. Onnur fiskasløg enn toskur, hýsa og upsi, sum skipið fær undir yvirlitstrolingunum, skulu eisini vigast, teljast og longdarbýtast hvørt sær, eins og aldursgreining av havtasku og svartkalva skal fáast til vega. Kemur gulllaksur í trolið, skal hesin frystast til nærri kanningar á landi.

Tað sigur Jákup Reinert í frágreiðing, sum hann nú hevur skrivað um túrarnar.

### Somu støðir

Trolstøðirnar - tað er, har trolað verður á túrinum – eru lagdar kring allan landgrunnin á dýpum, sum er minni enn 500 metrar. Landgrunnurin er býttur upp í 15 økir. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki og tiknar verða tilsamans 100 støðir um allan landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

Magnus Heinason ger tveir slíkar túrar um várið og tveir aftur um heystið.

- Av teimum 100 trolstøðunum vórðu 55 støðir tiknar á fyrra túrinum í vár og 45 støðir á hesum seinna. Sera vánaligt veður var at kalla á øllum túrinum, og hetta darvaði arbeiðnum hjá okkum. Seks støðir lógu eftir á fyrsta túri, sum vit ikki fingu tikið fyri veður, og vórðu hesar tískil tiknar á næsta túri.

Jákup Reinert sigur, at teir eisini fingu trolið fast í botn á øðrum túrinum.

- Ynskiligt er, at nytrurnar eru lisnar og øll data løgd inn í databasu sum skjótast og helst fyri 10. apríl, tí ikki fyrr enn øll data eru tøk, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum í vár.

Kortini heldur fiskifrøðingurin seg hava fingið vissu fyri nøkrum ávegis úrslitum, hóast øll data ikki eru tøk, og tað viðraði illa í vár.

### Við fyrivarni

Hann sigur, at nógv mest varð fingið av hýsu, og síðan í røðini koma ávikavist toskur, upsi, hvítingsbróðir og lítli kongafiskur.

- Um allar støðirnar í vár verða lagdar saman, síggja vit, at á teimum 100 støðunum vórðu veidd tilsamans 46 ymisk fiskasløg, ið er nakað meira enn vanligt. Harumframt vóru hummari, fýra sløg av høgguslokki og ymiskt skrambul fingið. Nógv mest var av hýsu, og síðan koma ávikavist hvítingsbróður, toskur, upsi og lítli kongafiskur. Hýsa varð veidd á 95% av støðunum, toskur á 86% og upsi og lítli kongafiskur á 80%.

Hann sigur, at størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa, men eisini fyri onnur sløg fast ein ábending um, hvussu nógv er til.

- Eitt nú tykist serliga hvítingsbróðir og lítli kongafiskur at vera heilt væl fyri, meðan nógv minni varð fingið av svartkjafti í mun til í fjør. Eisini vóru nøgdirnar av gulllaksi, havtasku, reyðsprøku og tungu minni í ár.

Í frágreiðingini sigur Jákup Reinert, at mathøggu-slokkur, ið annars bert plagdi at vera á Føroyabanka, nú hesi seinastu árini er vorðin alt vanligari á landgrunninum.

- Hetta samsvarar væl við fráboðanir hjá trolarum og garnabátum, ið royna á landgrunninum, sum hava sagt, at nógv hylki við rognum